## Lutakast hjá kvinnu-ungdómslandsliðum

Lutakast hevur júst verið í Nyon í Sveis, har finnast skuldi útav, hvørji lið skuldu møta hvørjum í EM-undankappingunum fyri U-19 og U-17 landsliðini hjá kvinnum. Í U-19 kappingini er Føroyar komið í undanbólk saman við Spania, Onglandi og Litava, og kappingin millum hesi londini verður í Litava í døgunum 27. september til 2. oktober. Okkara U-17 landslið hjá kvinnum er komið í bólk saman við Finlandi, Belgia og Estlandi, og henda kappingin verður avgreidd í Estlandi í døgunum 11. til 16. september, so bæði føroysku U-landsliðini skulu til baltisku londini í heyst.

## Maldini kann skriva italska fótbóltssøgu



38 ára gamli italski fótbóltsleikarin, Paolo Maldini, kann skriva italska fótbóltssøgu, tá felag hansara, AC Milan, skal í dyst ímóti Celtic í Champions League kappingini mikudagin. Maldini hevur í løtuni spælt 99 dystir í Champions League kappingini, og kemur hann á vøllin mikudagin, so verður hann tann fyrsti italiumaðurin, sum røkkur 100 dystum í Champions League. Higartil eru bert fýra leikarar, sum hava leikt 100 dystir ella fleiri í hesi kapping. Teir eru Raul (106), Roberto Carlos (105), David Beckham (102) og Oliver Kahn (100).

# Champions League í gongd aftur

**Fleiri stórdystir eru í væntu, tá sterkastu feløgini í Evropa fara í gongd við áttandeilsfinalurnar í kappingini fyri meistaralið, Champions League, sum verður skotin í gongd aftur í kvøld, týskvøld**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Ronaldinho og hansara liðfelagar í Barcelona skulu í ein spennandi dyst mikudagin, tá teir møta enska stórfelagnum, Liverpool, í áttandeilsfinalunum í Champions League.*

Nú hava tey flestu bíða leingi eftir at síggja sterkastu feløgini í Evropa í dysti aftur í sterkastu kappingini. Champions League kappingin hevur nevniliga verið í vetrarfrí síðani fyrst í desember mánaði, tá liðini spældu seinasta innleiðandi dystin í bólkaspælinum, og síðani tá hava nógvir fótbóltsfjepparar bíða eftir áttandeilsfinalunum. Her eru nógvir spennandi dystir í væntu, og nú skulu áhugað ikki bíða leingi afturat. Í kvøld, týskvøld, fara fyrstu áttandeilsfinalurnar nevniliga av bakkastokki.

### Stórfeløg í kreppu møtast

Í kvøld, týskvøldið, vera fýra dystir á skránni í Champions League kappingini, og serliga tann eini dysturin kann metast at vera ein sannur stórdystur. Hetta er dysturin ímillum tvey av mest vinnandi liðunum í Evropa, Real Madrid og Bayern München. Gongdin hjá hesum báðum liðum hevur als ikki verið eftir vild í heimligu kappingunum, so tí er umráðandi hjá stórfeløgunum at sleppa úr kreppuni, tey eru í júst nú.

Enska stórfelagið, Manchester United skal eisini í dyst týsdagin, tá teir vitja í Fraklandi hjá Lille. Lille hevur eitt gott lið, men Manchester United má átaka sær rolluna sum stórfavorittur undan hesum dystinum.

Í seinastu dystunum møtast Celtic og AC Milan í Skottlandi og PSV Eindhoven tekur ímóti einum øðrum enskum stórfelag, Arsenal.

### Liverpool á Camp Nou

Mikudagin verður ein sera spennandi dystur á skránni, tá síðstu tveir vinnararnir bresta saman. Í fyrra dystinum tekur sitandi meistaraliðið, Barcelona, ímóti enska Liverpool, og hetta er helst dysturin, sum flestu fótbóltsfjepparar bíða spentir eftir. Barcelona vann Champions League í fjør, men úrslitini í sterku kappingini hava ikki verið eins góð í hesum kappingarárinum, so nú er spurningurin, um Liverpool megnar at gera sær dælt av hesum.

Ein annar spennandi dystur verður ímillum Porto og Chelsea. Her skal kontroversielli Chelsea-venjarin, José Mourinho, aftur á gamlar gøtur, tá hann vitjar fyrrverandi felag sítt FC Porto, sum hann førdi til sigurs í júst Champions League kappingini í 2004.

Í seinastu tveimum dystunum mikudagin tekur suverena oddaliðið í italskum fótbólti, Inter, ímóti spanska stórfelagnum, Valencia, meðan oddaliðið í fronskum fótbólti, Lyon, skal ein túr til Rom at møta, AS Roma.

## Tippingin byrjar aftur

Sosialurin hevur skipað fyri eini tippikapping á heimasíðu sínari, har til ber at gita seg fram til úrslitini av teimum ymsu Champions League dystunum. Henda kappingin hevur ligið still, síðani Champions League kappingin fór í vetrarfrí, men nú er klárt at tippa aftur. Tippingin byrjar sjálvandi aftur í kvøld, tá Champions League kappingin fer í gongd við áttandadeilsfinalurnar. Til ber at tippa á tipping.sosialurin.fo

## Champions League

**Týsdag:**
- Real Madrid – Bayern München
- Celtic – AC Milan
- Lille – Manchester United
- PSV Eindhoven – Arsenal

**Mikudag:**
- Inter – Valencia
- Barcelona – Liverpool
- Porto – Chelsea
- Roma – Lyon

Kyndil-StÍF:

# Seinasti hálvfinalisturin kann finnast

**Kyndil og StÍF liggja og kappast um seinasta hálvfinaluplássið í Sunset kappingini, og mikukvøldið møtast júst hesi bæði liðini í høllini á Hálsi**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tvey lið hava ligið og kappast um týdningarmikla fjórða plássið í Sunset kappingini í alt ár, sum gevur atgongd til hálvfinalurnar í stríðnum um meistaraheitið. Her er talan sjálvandi um Kyndil og StÍF, og í løtuni eru tað kvinnurnar av Strondum, sum liggja betur fyri. Tær hava fýra stig, og eru sostatt tvey stig frammanfyri Kyndil á aftasta plássi, sum hevur tvey stig.

Gongdin hjá grøna havnarliðnum hevur heldur ikki verið serliga góð síðstu dystirnar. Í endaspælinum hava tær enn sín fyrsta sigur til góða. Tær hava tapt fimm teir fyrstu dystirnar á rað, og tí sær ikki so gott út hjá teimum í løtuni.

Hjá StÍF hevur gingið heldur betri. Tær hava vunnið ein dyst av fyrstu fimm dystunum í endaspælinum, og hesin var júst ímóti Kyndli, tá liðini møttust í fyrra dystinum inni á Skála. Í hesum dystinum førdi Kyndil annars í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki avgjørdi StÍF alt til egnan fyrimun. Strandakvinnur vunnu dystin við fýra málum, og sostatt vóru tað brádliga tær, sum lógu á fjórða plássinum, sum gevur atgongd til hálvfinalurnar.

Nú møtast liðini so fyri seinastu ferð í ár, og vinnur StÍF dystin, so er eingin ivi um, at tær fara at røkka hálvfinalunum. Vinnur Kyndil hinvegin, so stendur púrasta á jøvnum millum liðini, og tá kunnu seinastu dystirnar ímóti hinum liðunum gerast avgerandi.